


**Húskallar hava sín uppruna í einum gátuførum fjósi í Leirvík. Nú eru teir aftur til reiðar – Kaj og Alberg og allir hinir í bólkinum. Mynd: Sunva Lassen**

# Úr fjósinum í Leirvík

**Húskallar úr Leirvík fara aftur á pallin, og so er lagt upp til ársins kultkonsert við klassikarum sum Hans Ansgar, Knarvakotið, Boyggjar og Ria**

Tað munnu verða fáir bólkar í Føroyum, sum hava klárað at gjørt so nógv um seg sum Húskallar við bara at geva eina útgávu út og spæla nakrar fáar konsertir. Húskallar við kjarnuni úr Leirvík gávu í 1991 eitt kassettubond út, teir spældu nakrar fáar sangir, og tað var tað.

Men tað, sum kundi verið leyst og liðugt – gloymt eftir einari lítlari løtu – gjørdist til eina legendariska útgávu í føroyskum tónleiki. Sangirnir kundi eingin jarða, hóast bólkurin ongantíð fekk veruliga luft undir veingirnar sum konsertbólkur, og hesi mongu árini, síðani útgávuna hjá Húskallum, hava sangir sum Bóndin Hungrar (Knarvakotið), Ria, Hans Ansgar og Aftur Nú verið tráspældir í føroyskum útvarpi.

Og nú skal tað so verða – tað stóra comebackið. Húskallar hava funnið saman aftur, teir eru farnir í venjingarhølini, og leygarkvøldið spæla teir til sína størstu konsert nakrantíð – á Føroya størsta tónleikapalli frammanfyri kanska 10.000 fólkum.

### Úr fjósinum

Bólkurin Húskallar spretti úr gátuføra "Fjósinum" í Leirvík og spjaddi seg miðvíst til tónleikaumhvørvið í Havn fyrst í nítiárunum. Verkætlanin var úrslit av hollum føroyskum sangsmíði og impulsivum ánarum av upptøkuhølunum LT Studio.

Herluf Sørensen og Kári Poulsen vóru í hesum høpi millum ídnastu stuðlar hjá bólkinum.

Originalarnir úr Leirvík, Kaj Johannesen og Jákup Alberg Eliasen, vóru millum teir, ið høvdu feskt og óbrúkt sangtilfar liggjandi, og bæði tónleikarar og onnur áhugað syrgdu skjótt fyri at útvega stóru manningini høvið at festa sangirnar á band. Og soleiðis bleiv. Á útgávuni, sum verkætlanin við flestu av landsins fremstu tónleikarum í hópinum, sendi á marknaðin á sumri í 1991, er ein snøgt skorin sangskattur, sum enn í dag ljóðar í útvarpslurtum um landið.

### Fjølment veitsla á Vágsbøi

Fyrireikararnir av Summarfestivalinum kannaðu fyrr í ár møguleikan at savna manningina, sum fyri 16 árum síðani stóð fyri einari av sermerktastu føroysku tónleikaútgávunum í nýggjari tíð. Høvið var forkunnugt, og tónleikararnir, ið mannaðu Húskallar, vóru skjótir at taka av. Við á bandinum, sum bólkurin lat frá sær fyri sekstan árum síðani vóru ikki færri enn 19 ymiskir tónleikarar. Flestu av teimum vera aftur við í summar, tá ið harðmælta og litfagra manningin "í myrkamorreyðum troyggjum, virkaðum úr føroyskari ull og í kolli" fer at seta ferð á árligu veitsluna í miðbýnum í Klaksvík.

Fjøldin hevur fingið boðini, og kátir Húskallar eru aftur til reiðar at tæna. Komið á Vágsbø til ársins veitslu; har verður svongd og har verður ferðsla, har vera Ria og Hans Ansgar, har vera Beiggjar og har verður ball!

Leygarkvøldið 4.august fara Húskallar at syrgja fyri ársins føroysku kultframførslu á Summarfestivalinum 2007.

Summar Festivalur